# Herverk við farstøðina

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan í Havn hevur havt fleiri smámál at taka sær av hetta vikuskiftið. Tvær fráboðanir eru komnar um herverk.

Fríggjakvøldið hevði onkur gjørt seg inn á ein bil, sum stóð parkeraður fyri náttina við farstøðina, og motorhjálmurin var illa farin. Tað er ikki vanligt, at løgreglan hevur nakra hóming av, hvør fremur øll hesi herverkini, men í hesum føri, heldur hon seg vita, hvør stendur aftanfyri ógerðina.

Í Steinatúni hevur onkur brotið neonskeltið hjá kioskini. Hetta hendi leygarnáttina.

### Svína til av bili

Onkur hevur vent sær til løgregluna um vikuskiftið og gramt seg um ein bil, ið ikki hevði víst ansni fyri teimum gangandi.

Viðkomandi var illa dálkaður, tá ein bilur koyrdi í ein hyl á vegnum. Persónurin fekk nummarið og meldaði til løgregluna. Bilførarin kann vera ákærdur fyri brot á ferðslulógina, tí allir hava »forpliktelse overfor gående« sambært lógini.

Annars hevur løgreglan ikki fangað nakran, ið hevur koyrt ov skjótt ella við kenning hetta vikuskiftið. Tveir persónar hava verið og sovið rúsin av sær inni í klivanum, og tað er minni enn vanligt.

# 8.000 krónur stolnar í innbroti

**Fleiri innbrot hava verið í handlum í Niels Finsensgøtu í Havn um vikuskiftið. Fýra ferðir hava tjóvar verið uppá spæl. Fríggjanáttina brutu ótangar seg inn í Beauty Line, har 8.000 krónur eru tiknar**

INNBROT
*Stefan í Skorini*

Innbrotstjóvar hava veruliga gjørt um seg hetta vikuskiftið. Fyritøkan Beauty Line kendi sviðan av hesum. Fríggjanáttina hava óbodnir gestir verið á gátt og tikið 8.000 krónur úr kassanum.

Innbrotstjóvarnir eru slopnir inn gjøgnum eitt lítið vindeyga í kjallarahæddini hjá Radiohandlinum, har Beauty Line heldur til.

Síðani eru teir farnir í pengakassan, sum er brotin upp, og peningurin er tikin úr. 8.000 krónum fingu teir hendur á, og tað er ikki so galið fyri eina nátt.

Annars er einki tekin um herverk á staðnum. Teir hava bara tikið peningin og sloppið sær burtur. Løgreglan veit einki at siga um gerningsmenninar. Eingi vitni eru funnin enn, og tí er ilt at siga nakað hesum viðvíkjandi.

### 1.000 krónur í nátt

Sunnunáttina hava innbrotstjóvar aftur verið í penganeyð. Hesuferð gjørdu teir meira um seg við at bróta inn í trimum støðum. Løgreglan fekk fráboðan um hetta mánamorgunin.

Fyrst varð farið í verkstaðið hjá Radiohandlinum, ið er í kjallaranum í Niels Finsensgøtu 16. Har var einki at taka, og tí fóru menn víðari til Beauty Line í sama bygningi, sum enn einaferð var offur fyri innbroti. Har var allur peningurin longu tikin, og tí hildu tjóvarnir fram.

Farið varð í grannahúsini, har handilin Thomas Dam Búnýti er at finna. Endiliga fingu gerningsmenninir hendur á reiðum peningi. 1.000 krónur vórðu tiknar úr kassanum, og her endaði náttarútferðin. Eisini hesuferð sluppu tjóvarnir inn gjøgnum eitt lítið vindeyga aftanfyri.

Løgreglan sigur seg hava ein væl grundaðan illgruna um, at hetta eru somu persónar, sum hava framt hesi trý innbrotini. Framferðarhátturin er tann sami, og tey eru eftir øllum at døma framd beint eftir hvønn annan.

Heldur ikki í hesum førinum er tað eydnast løgregluni at fáa nakra ábending at ganga eftir. Hyggja vit at teimum innbrotum, sum eru framd seinastu tíðina, so sleppa innbrotstjóvar oftast væl frá slíkum lógarbrotum.




*Hesin bygningurin í Niels Finsensgøtu hevur havt tvey innbrot um vikuskiftið, og grannahúsini hjá Thomas Dam hava eisini staðið fyri skotum*

# Eltu bil í Klaksvík

LØGREGUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Um vikuskiftið fekk løgreglan í Klaksvík fráboðan um ein bilførara, ið hevði koyrt vitleyst í miðbýnum. Løgreglan fekk nummarið á bilinum og royndi at elta hann, men tað eydnaðist ikki at finna føraran aftur.

Tað er sum so einki óvanligt, at førarar koyra skilaleyst í býnum, og tað verður fráboðað løgregluni, men tað er ikki altíð, at fólk fáa nummarið við.

Sunnumorgunin fekk løgreglan í Klaksvík fráboðan um húsaófrið í býnum. Fólk vórðu blivin heldur heit, og tí helt onkur tað vera neyðugt at tilkalla løgregluna. Tá hon kom á staðið var støðan ikki so álvarsom, at hon var noydd at skilja partarnar.

# Maður lá undir lastbili

ARBEIÐSÓHAPP
*Stefan í Skorini*

Sunnukvøldið klokkan hálvgum níggju hendi eitt arbeiðsóhapp á bryggjuni í Tjaldavík, sum er nakað sunnanfyri Øravík í Suðuroy.

Tveir mans arbeiddu við at lossa alifóður av tveimum lastbilum, tá óhappið hendi. Brádliga fær lastbilurin yvirbalansu, og hann koppar omanyvir menninir. Báðir royna at leypa á sjógv undan bilinum, men tann eini er ov seinur. Hann kemur at liggja undir bilinum.

Tíbetur fekk maðurin ikki álvarsamt mein av óhappinum. Hann breyt bara beinið, meðan hin slapp snikkaleysur. Teir sluppu sostatt væl frá tí.

Orsøkin til at bilurin koppaði var hon, at undirlendi har lastbilurin stóð, ikki var nóg trygt. Fóturin á lastbilinum, sum verður nýttur at stuðla uppundir bilin meðan lossað verður, glíður í lendinum, og tí koppaði lastbilurin.

# ítróttur

Nr. 164 • Týsdagur • 28. august 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

## Hetjurnar frá Landskrona



Síða 15

# Kenna seg illa viðfarnar



*Jákup Mortensen heldur tað vera tiltrongt, at greiðar reglur verða gjørdar fyri, hvussu farast skal fram, tá føroysk feløg eru úti í Europa og royna seg*

**Í Runavík kenna tey seg sera illa viðfarin av FSF. – Vit verða slettis ikki eftirspurdir, sigur formaðurin í felagnum um avgerðina at flyta dystin millum HB og NSÍ**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum vit nevndu í leygardagsblað okkara, so tóktust runavíkingar alt annað enn nøgdir um, at dysturin millum HB og NSÍ, sum skuldi verið leiktur sunnudagin, varð fluttur til týsdagin.

Serstakliga var venjarin illur um, at at hann fríggjadagin á middegi framvegis ikki visti, nær dysturin skuldi spælast, men sum kunnugt, so varð hetta staðfest seinni sama dag.

### Illa viðfarin

Hetta er tó ikki tað einasta, sum runavíkingar eru illir um. Yvir høvur kenna teir seg sera illa viðfarnar av kappingarstjóranum, og á heimasíðuni hjá NSÍ, www.nsi.fo, er samrøða við formannin, Jákup Mortensen, har hann greitt gevur til kennar, at hann er harmur um viðferðina. Tað sama segði hann eisini við Sosialin, tá vit sunnukvøldið fingu orðið á hann.

- Eg kann bara siga, at vit kenna okkum serdeilis illa viðfarnar av kappingarstjóranum í hesum málinum. Vit fingu fyrst ein fyrispurning frá HB, um at flyta dystin. Vit vildu ikki ganga hesum á møti, og síðani frætta vit einki, fyrr enn vit fríggjadagin eftir døgurða fáa eitt faks, har tað stendur, at dysturin verður leiktur týsdagin, sigur Jákup Mortensen.

- Tað er serliga tað, at tú við hesum tekur allan diskussiónsrætt frá felagnum. Sjálvandi hevur kappingarstjórin heimild til at skera ígjøgnum, men tað er sera harmiligt, at hann als ikki tekur feløgini við upp á ráð í viðgerini av málinum. Hóast vit avvístu fyrispurninginum frá HB í fyrstu syftu, so hevði man helst kunna funnið eina loysn, sum var til at liva við, um so var, at partarnir tosaðu saman um málið, men tað verður so ikki gjørt.

- Hetta gongur eisini út yvir aðru deild hjá okkum. Nakrir leikarar skuldu ætlandi niður av fyrsta liði, men tað fáa teir ikki gjørt, tá teir ikki kunnu leypa dystum. Ein loysn kundi verið, at dysturin varð leiktur mánakvøldið, og at vit so fingu loyvi at flyta spælarar niður.

Formaðurin sigur víðari, at hann væl dugir at síggja, at fyrireikingarnar hjá HB miseydnaðust men hann heldur tó ikki, at hetta kann nýtast sum umbering.

- HB hevur nú í nógv ár tikið lut í europeisku kappingunum, so teir áttu at vita, hvussu ferðingin aftur og fram skuldi skipast.

### Ikki fyrstu ferð

Annars er Jákup Mortensen sera beiskur inn á framferðarháttin hjá kappingarstjóranum. Ikki bara í hesum málinum, tí runavíkingar vóru eisini noyddir at flyta dyst fyrr í ár.

- Tað var dysturin móti FS Vágum, sum vit noyddust at flyta. Trupulleikin var ikki at flyta dystin, men tá dystarskráin hjá okkum gjørdist sera tøtt, vildu vit broyta ætlaðu ásetingina av dystinum. Hetta tí vit um sama mundi skuldu spæla báðar hálvfinalurnar í steypakappingini móti KÍ.

- Ta ferðina legði kappingarstjórin bara hornið á, mitt í eini samrøðu, og so var púra ógjørligt at fáa fatur á honum aftur. Hann tók ikki telefonina, og so komu boðini um dystarflyting á sama hátt sum hesaferð. Bara sum eitt diktat.

- Tað haldi vera ein somikið ófólkaligan framgangsmáta, at tað undir ongum umstøðum kann góðtakast.

### Reglur eiga at gerast

At enda spurdu vit so eisini formannin í felagnum, um NSÍ ætlar at fara víðari við hesum málinum, og um so er er, hvat felagið ætlar at gera. Á heimasíðuni hjá felagnum verður nevnt, at ein møguleiki kundi verið at reist misálitisváttan móti kappingarstjóranum á komandi aðalfundi, men somikið langt tykist Jákup Mortensen ikki ætla sær at fara.

- Eg haldi tað vera av stórum týdningi, at vit fara eftir bóltinum og ikki eftir manninum í hesum málinum. Eg havi so ongar persónligar ætlanir um at leggja eftir Børge B. Hansen, tí vit skulu øll virka í felag í hesum umhvørvinum framyvir.

- Eftir mínari fatan ræður fyrst og fremst um, at vit finna út av, hvussu vit kunnu skipa ein fastan leist, soleiðis at feløgini longu við ársbyrjan vita, hvussu farast skal fram, tá feløg luttaka í europeiskum kappingum. Tað ber ikki til, at tað hvørja ferð skulu fremjast broytingar mitt í kappingarárinum.

- Tað, sum tað snýr seg um, er at vit eru troyttir av at vit áhaldandi verða ignoreraðir av kappingarnevndini hjá FSF, og vit ætla okkum so ikki at lata málið fara fram við uttan víðari, sigur Jákup Mortensen at enda.

# Krzystof fer til VB

Seinastu tíðina hava leysasøgur gingið um, at venjarin hjá VB, Krzystof Popczynzki, er á veg til Gøtu, har hann skal spæla fótbólt komandi árið.

Vit hava áður roynt at fingið hesi tíðindi váttað, men hetta hevur tíverri ikki eydnast okkum, og sum tað sæst aðra staðni í blaðnum, so vórðu tíðindini avsannað so seint sum sunnukvøldið.

Beint áðrenn døgurða fingu vit tó tíðindini váttað av formanninum í GÍ. Svenn Olsen sigur, at sáttmáli nú er skrivaður við Krzystof Popczynzk. Orsøkin til, at teir ikki hava vilja váttað tíðindini áður er, at allir partar í málinum ikki vóru kunnaðir, men formaðurin sigur nú, at alt hetta er komið í rættlag.

Talan verður tó ikki um, at Krzystof skal venja gøtumenn, soleiðis sum hann hevur gjørt tað í Vági. Johan Nielsen, sum burtur sæð frá einum lítlum millumspælið miðskeiðis í nítiárunum hevur vant GÍ síðani 1989, hevur longt sáttmálan við GÍ, og ætlandi verður hann framvegis venjari í Gøtu tey bæði komandi árini.

*-jm*